
Karl Vidtfeldt

## Bilradio hósdagin kl. 17.15

Í sendingini Bilradio á Rás2 hósdagin kl. 17.15 presenterar Global Dry Ice vasking av bilum við turrum ísi. Vitjað verður á einum skeiði í motorstýring og feilfinning á Bildeildini á Tekniska Skúla, har m.a. samrøða er við Karl Vidtfeldt frá Bil- og Maskinverkstaðnum á Sandi. Eisini er samrøða við Carl Ole Olofsen, sølustjóra, sum hevur selt dekk í Føroyum í 30 ár.



MOTORUR

*Motorrúmið er sum á einum spildurnýggjum bili*


*Skeið í motorstýring og feilfinning á Bildeildini á Tekniska Skúla í Havn*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Skeið í motorstýring og feilfinning

Í døgunum 26. og 27. mai skipaði FTZ fyri skeiði í motorstýring og feilfinning á Bildeildini á Tekniska Skúla í Havn.

Tað vóru Hans Erik Kristoffersen frá FTZ og Karsten Kjeldsen frá Elektropartner, sum hildu skeið fyri mekanikarum frá ymiskum bilverkstøðum kring landið.



*Fríðrikur Bláhamar frá FirstStop Atlantic saman við Carl Ole Olofsen og Torben Nielsen frá Bridgestone í Danmark*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

# Móttøka fyri sølustjóra

Í sambandi við at føroyavinurin Carl Ole Olofsen, sølustjóri hjá Bridgestone í Danmark, er farin frá fyri aldur, var móttøka fyri honum hjá FirstStop Atlantic / SuperDekk Hoyvíksvegur við Hoyvíksvegin í Havn fríggjadagin.

Carl Ole Olofsen, sum hevur verið dekksølumaður í yvir 30 ár, hevur javnan ferðast til Føroyar síðan 1980. Fyrstu mongu árini sum sølumaður fyri Goodyear og seinastu fýra árini fyri Bridgestone. Undir móttøkuni var eisini høvi at heilsa upp á Torben Nielsen, sum nú hevur tikið við sum sølustjóri hjá Bridgestone við ábyrgd av Føroyum.

FESTIVALUR

*Trucker Festivalurin var ein flott framsýning av lastbilum*

*Mynd: Hans A. Norðfoss*



# Trucker Festivalurin 2010

Um vikuskiftið var Trucker Festivalurin 2010 í Klaksvík. Hetta er áttanda árið á rað, at festivalurin varð hildin.

Eins og í fjør varð ein sonevndur showbilur avdúkaður, tá festivalurin byrjaði leygardagin. Hesaferð var tað ein Volvo hjá Henrik Kofod. Bilurin er flottur og vakti veruliga ans á festivalinum.

Umframt sjálvan Trucker Festivalin varð eisini skipað fyri bilboksing. Sum nakað nýtt var fiskikapping við kranabilum.

Fyrireikararnir Leif Eliasen og Hugo Skorastein siga, at nógv fólk vitjaðu festivalin, sum var ein flott framsýning av lastbilum. Sunnudagin var steypahandan fyri flottastu bilarnar, og Trucker Festivalurin 2010 endaði við, at bilarnir koyrdu í konvoy úr Klaksvík kl. 17.30.